# FÆRØERNE 1911

## – set af den danske fotograf Anders Peter Hansen







*Fig. 72. Rinkusteinur ved bygden Oyndarfjørður. Lidt uden for bygden ligger de to kendte Rinkusteinarnir (rokkestenene), som sættes i bevægelse af bølgerne. For at se om de bevæger sig, er der bundet et tov fra stenene til fastlandet, så man kan følge bevægelserne. Det er et uopklaret mysterium, hvorfor disse kæmpesten bevæger sig ved bølgebevægelserne. Ifølge et sagn var der en gammel troldkvinde i Oyndarfjørður, der forbandede to sørøverskibe, så de blev til sten. Forbandelsen sagde, at de for evig tid skulle stå ved strandkanten og rokke hvileløst frem og tilbage. De tre personer er antagelig Hejne Dahl (f. 1872), Justinus Ejdesgaard (f. 1884) og Andreas Marius Frederik Petersen (f. 1887).*



*Fig. 71. Handelsbygningen Víkahandilin i bygden Oyndarfjørður. Andreas Marius Frederik Petersen (f. 1887) og hustruen Malena (f. 1888 med pigenavnet Clementsen). Den lille dreng er antagelig sønnen Peter Ernst (f. 1910) og pigen Elgerda Pouline Jacobsen (f. 1905 i Tórshavn), en kusine til Malena. Handelen var etableret umiddelbart efter Monopolhandelens ophør i 1856*[22].





# SIGLING & ÚTBÚGVING I

Óli Olsen

men fór síðan til Noregs, har hann var við hvalastingara, sum veiddi í Suðurishavinum, í 7 ár. Í hesum tíðarskeiði var hann bert heima tað eina summarið.[111]

Jóan Petur Davidsen andaðist 12. desember 1942.



*Hans Djurholm. 01.02. 1877 – 14.06.1951. Skiparaprógv tók hann hjá Pól Nikláa Danielsen, Saltangará, í 1900, og stýrimansprógv í Keypmannahavn 1903.*

**Hans Djurholm**

Tá ið vit hoyra skiparan Hans Djurholm nevndan, kemur *Pilot* okkum til hugs. Hesa slupp keypti hann úr Onglandi í 1904, og hann førdi hana til 1914, onkran hendinga túr undantiknan. Í 1916 seldi hann *Pilot* til Óla Petersen – Óla á Miðgerði – skipara í Fuglafirði.

Tvær ferðir var Hans Djurholm í Keypmannahavn og seks ferðir í Onglandi og Skotlandi við saltfiskafarmi við *Pilot*. Upp aftur hevði hann vøru til ymsar keypmenn.

Um vetrarnar helt Djurholm skiparaskúla. Hann byrjaði inni hjá foreldrunum í Heimistovu á Glyvrum veturin 1903-04. Her helt hann skúla til og við veturin 1907-08. So kom steðgur í, til hann hevði bygt sær hús við skúlastovu. Frálæruna tók hann upp aftur á heysti 1912, og nú undirvísti hann allar vetrarnar, til hann gavst á vári 1928. Tá høvdu 131 mans tikið prógv hjá honum.

Av tólum í frálæruni nýtti Djurholm sekstant, kumpass og peiliapparat, sigur heimildarmaður. Ravmagn var einki, men Storm King lampurnar lýstu væl. Um próvtøkuna sigur sami maður, at fyrstu árini fór hon fram umborð á verjuskipum, sum lógu fyri akkeri úti fyri Glyvrum. Men seinni fóru teir til Havnar at taka prógv. Ein maður kom altíð niðrifrá, tá próvtøka skuldi vera, og so fóru teir til Havnar og upp saman við næmingunum har.

> „Djurholm undirvísti einsamallur, men tá ið hann var í skipasýnisørindum, hevði hann menn at halda skúla fyri seg. Tað vóru teir báðir glyvramenninir Per á Sýnini (Jacobsen) og Per hjá Vensili (Steingrund), sum plagdu at skiftast," sigur heimildarmaðurin at enda.[112]

*Lívssøga*

Hans Jóhannes Hansen, ið tók sær eftirnavnið Djurholm, varð føddur á Glyvrum 1. februar 1877. Hann gekk í skúla hjá Jóhannes Petersen, sum var lærari í allari Nes sókn. Annars arbeiddi hann á garðinum hjá pápanum Niels Paula, ið var

bóndi. 17 ára gamal í 1894 fór Hans til skips við sluppini *Delphinen*, ið Pól Niklái Danielsen førdi.
Árið eftir var Djurholm við sama skipi og skipara, men síðani fór hann at sigla við Hest-Jóannesi í nøkur ár. Var eitt ár við *Dauntless* og trý við *Cyclone* hjá Jens í Dali, tað seinasta sum bestimaður. Veturin 1898/99 var Djurholm í Grimsby, har hann var við at leggja nýtt dekk í sluppina *Atlantic* hjá Jens í Dali.
Heystið 1899 fór hann at læra til skipara hjá Pól Nikláa Danielsen, og skiparaprógvið tók hann í apríl 1900 umborð á verjuskipinum *Guldborgsund*. Sama árið varð hann bestimaður hjá Pól Nikláa Danielsen við *Delphinen*. Árið eftir førdi hann sluppina *Grace* hjá Thomsen á Tvøroyri.
Á heysti 1901 fór hann niður til Keypmannahavnar at ganga upp á stýrimansskúla. Haðani tók hann prógv í mars 1903. Liðugur við skúlan fór hann út at sigla við einum donskum farmaskipi, men kom heimaftur móti vetri. Og nú var tað, at hann fór at halda skiparaskúla.
Várið eftir fór Djurholm til Onglands at keypa skip, og her valdi hann sær sluppina *Pilot*. Men hon hevði ein botnskaða og skuldi høvuðsumvælast, áðrenn hann kundi fara við henni. Ferðin gjørdist drúgv, tí hann var alla tíðina hjástaddur og hevði eftirlit við umvælingini.



*Sethúsini hjá Djurholm á Glyvrum. Skúlastovu hevði hann í kjallaranum. Seinastu skiparanæmingarnar førdi hann til prógvs í 1928.*




*Skiparaflokkur hjá Djurholm á Glyvrum veturin 1924-25. Fremsta rað frá vinstru: Smádreingirnir eru Niels Pauli og Lassen, synir Djurholm. Mourits Mohr, Fuglafjørður, Hans Djurholm, lærari, Tummas Lervig, Leirvík og Debes Danielsen, Heiðunum. Annað rað frá vinstru: Arnold Rasmussen, Søldarfjørður, Jóan Jákup Toftegaard, Fuglafjørður, Petur Poulsen, Heiðunum, Niels P. Midjord, Fuglafjørður, Sámal Hans Hansen, Norðragøta og Jens Davidsen, Æðuvík. Triðja rað frá vinstru: Jóan Petur Bertelsen, Strendur, Anton Johansen, Strendur, Hans Andrias Højgaard, Rituvík, Jákup Vang, Glyvrar, Hjalmar Jacobsen, Vestmanna og Jákup Andrias Joensen, Norðragøta. Aftast frá vinstru: Símun Danielsen, Strendur og Georg Olsen, Søldarfjørður.*

Djurholm var ikki burtur eftir at hava ført *Pilot* uttan í 1929, tá hann førdi *Bearnaise* úr Fuglafirði niður til Aberdeen við lastini, teir høvdu fiskað yviri í Grønlandi hetta summarið.

Í 1919 varð Hans Djurholm settur sum skipasýnismaður hjá Statens Skibstilsyn. Teir vóru tríggir í Føroyum. Hinir vóru brøðurnir Jákup og Jógvan við Stein, sum búðu í Havn. Teir býttu arbeiðsøkið sínámillum soleiðis, at Djurholm var mest á Skálafirði, Skála sleipistøð og í Fuglafirði, men hann fór tó av og á til Vestmanna og Klaksvíkar.

Hesi árini plagdu einar 40-45 sluppir at liggja fyri teymi á Skálafirði um vetrarnar. Tær lógu við Strandalandið frá Sjóvar kirkju inn móti Gjaranesi. Um várini og millum túrar á sumri hevði Djurholm væl av eykaarbeiði við at rætta kumpass, og serliga aftaná at sluppirnar høvdu fingið motor. Hann fór frá sum skipasýnismaður í 1950.[113]

Áðrenn lækni kom í Nes sókn, varð mangan heitt á Djurholm, tá óhapp hendu, eitt nú tá ið fólk brutu arm ella bein. Hann hevði eisini nakað av útgerð at nýta, tá fyrstahjálp var neyðug. Mong vóru álitisstørvini, honum vóru litin í hendi í sóknini, og flestu teirra ólønt. Annars livdi hann sum flestir glyvramenn tá í tíðini: hevði trøð og kúgv, og væl dámdi honum at vera á floti. Hans Djurholm andaðist 14. juni 1951.

## 1917

**Brøðurnir Joensen við Stein**

Djurhus, Mads Winther;
f. Skopun: 19-07-1894
Hejnesen, Jacob;
f. Klaksvík: 15-10-1898
Lind, Hans;
f. Svínoy: 16-08-1894
Poulsen, Hans Jacob;
f. Eiði: 20-08-1893

**Hans Djurholm**

Berg, Marius;
f. Elduvík: 22-08-1894
Hansen, Hans Chr. R.;
f. Leirvík: 28-04-1886
Hansen, Joen Dorius;
f. Leirvík: 18-09-1892
Jacobsen, Thomas Jacob;
f. Nes, Eysturoy: 09-06-1897
Lamhauge, Jacob Andreas Juul;
f. Tórshavn: 26-12-1887
Olsen, Hans H.;
f. Gøtugjógv: 28-09-1892
Petersen, Andreas M. F.;
f. Oyndarfjørður: 03-06-1887
Thomsen, Oliver Ernst;
f. Gøtugjógv: 28-06-1897